# Politistøðin í Havn fær nýtt andlit



Føroysk løgreglufólk hava ikki roynt at dylja, at tey hava verið ónøgd við útsjóndina á løgreglustøðini í Jónas Broncksgøtu í Havn. Nú er arbeiðið at umvæla støðina loksins byrjað. 31. oktober 2008 skrivaði Sosialurin, at politistarnir í nógvum førum skammast av støðini í Havn. - Hetta er kanska ljótasti bygningur í Havnini og fólk finna ofta ikki inngongdina, segði Jan Poulsen, politistur og formaður í Politistafelagnum, við Sosialin tá. Í samrøðu við Sosialin sama dag avdúkaði Jón Klein Olsen, politiovasti, eisini, at hann á ongan hátt var ósamdur við útsagnirnar hjá formanninum í politistafelagnum, men at hann fegnaðist um, at broytingar vóru á veg. Tær broytingarnar, ið Jón Klein Olsen tá tosaði um, er nú loksins við at verða gjørdar. Nú verður nevniliga arbeitt við umvæla fasaduna á bygninginum, sum tað eisini framgongur av myndini. Sostatt kunnu vitjandi á Politistøðini síggja fram til eina meira innbjóðandi politistøð, hóast tey flestu nokk munnu ynskja sær so fá ørindi har, sum gjørligt.

# Tórshavnar havn vaknar

**Veruligt lív er við at koma í Tórshavnar Havn. Sætta stóra ferðafólkaskipið kom í morgun, og fleiri seglbátar úr ymiskum tjóðum liggja longu við bryggju**



*Veruligt bátalív er í Tórshavnar Havn. Í morgun lógu hesir tríggir seglbátarnir inni í Vágsbotni, og í baksýninum sæst ferðafólkaskipið Azamara Journey, ið stevndi inn við 603 ferðafólkum í morgun*

*Mynd: Rógvi Nybo*

FERÐAFÓLK

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

– Í ár verður helst rekord. Tað rokna tey við á Havnarskrivstovuni í Tórshavnar Havn. Higartil hava 48 ferðafólkaskip boðað frá, at tey stevna inn á Havnina gjøgnum summarið, og tað er meira enn nakrantíð áður.

Í morgun stevndi ferðafólkaskipið Azamara Journey, ið er heimahoyrandi á Malta, inn á Havnina við 603 ferðafólkum. Umborð eru serliga nógvir danir, 150 í tali, og amerikumenn, 170. Hon hevur seinast verið inni í Lerwick í Hetlandi, og steðgar her á vegnum til Akureyrar.

Hetta er tað sætta ferðafólkaskipið, ið kemur á Havnina í ár, og lagt er upp til ein javnan streym av ferðafólkaskipum. Heili 48 skip hava boðað frá, at tey ætla at koma inn á Havnina, og tað er tað mesta nakrantíð.

Seinastu árini hevur talið verið støðugt vaksandi, í 2002 vóru tey 23, í 2004 vóru tey 42 og í 2006 vóru tey 44 skip.

### Seglbátalív

Í morgun lógu eisini tríggir seglbátar í Vágsbotni, úr Finnlandi, Álandi og úr Danmark. Tað er eisini javnan at seglbátar koma inn á Havnina, men á Havnarskrivstovuni vátta tey, at tað er verri at halda skil á, hvussu nógvir teir verða í ár.

Tað er ikki altíð, at teir boða frá í góðari tíð, áðrenn teir koma, so tað er ikki til at vita, hvussu nógvir teir verða.

– Men teir eru nokk eitt sindur færri í ár, enn teir hava verið onnur ár, sigur havnarmeistarin Jónsvein Lamhauge.

# Fylgja enn væl við svínakrími

**Eingin tilburður av svínakrími er staðfestur í Føroyum, men Landslæknin og Pandemibólkurin fylgja framvegis neyvt við gongdini**

SVÍNAKRÍM

*Sosialurin/Rás2*
*Rógvi Nybo/Eyðun Klakstein*
*rogvi@sosialurin.fo / eydun@ras2.fo*

**Høgni Debes Joensen, landslækni, segði við Rás 2 í gjár, at higartil hevur H1N1 beinkrímið ikki verið verri enn tær vanligu influensurnar.**

**- 8 tilburðurin av H1N1 kríminum eru skrásettir í Danmark, men í Føroyum hevur eingin tilburður verið, og eingin hevur boðað frá við illgruna um nakran tilburð, segði Høgni Debes Joensen.**

**- Vit eru bert 1/100 av fólkatalinum í Danmark, og har hava tey bert havt 8 tilburðir, so tað er ikki so løgið, at vit ikki hava fingið krímið hendan vegin enn, greiddi landslæknin frá.**

**Hann heldur tó, at tað er ov tíðliga at avblása tilbúgvingina, sum varð sett í verk í sambandi við H1N1 síðst í apríl mánaði.**

**- Vit eru í einari byrjanarfasu, og vit vita ikki, um H1N1 kann fara at breiða seg meira ella tað fer at hasa av, og tí fylgja við framhaldandi gongdini og halda fast við tær vegleiðinar, sum vit góvu í apríl, segði Høgni Debes Joensen við Rás 2.**

# Fuglafjørður nýggjan vinarbý



**Fuglafjarðar kommuna hevur fingið nýggjan vinarbý. Um vikuskiftið vóru fólk úr Norðurthing kommunu í Íslandi á vitjan í Fulglafirði, og tá varð vinarbýarsáttmáli undirskrivaður**

VINARBÝIR

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Í vikuskiftinum 5. til 8. juni 2009 vóru umboð fyri Norðurthing kommunu (Húsavík) í Íslandi á vitjan hjá Fuglafjarðar kommunu. Í hesum sambandi varð vinarbýarsáttmáli undirskrivaður millum kommunurnar báðar galdandi frá 6. juni 2009.

Norðurthing kommuna varð umboðað av 5 fólkum við borgarstjóranum Bergi Elias Águstsson á odda. Vinarbýarsáttmáliin, sum undirskrivað varð av borgarstjórunum báðum, snýr seg í høvuðsheitan um niðanfyri standandi:

- At styrkja um vinarbýarsamstarvið við at stovna og varðveita vinarliga sambond við hvønn annan.
- At fremja tað sínámillum fatan og virðing millum borgarar í Fuglafjarðar og Norðurthing kommunum.
- At eggja og stuðla ungdóms- og vaksnamannafeløgum, bólkum og øllum samfelagsstættum í kommununum báðum til at vitja hvønn annan.
- At skifta orð um upplýsing og vitjanir, fyri til allar tíðir at menna menniskjalig og mentanarlig sambond og skapa ein tryggan grundvøll fyri framtíðarfatan, virðing og vinarlagi millum okkara borgarar.